# SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI PARTIN AV KARLAMAGNUSARBREYT ÍMILLUM RÓLANTSGØTU OG ÓLIVANTSGØTU

Parturin av Karlamagnusarbreyt ímillum Rólantsgøtu og Ólivantsgøtu var ovasti partur av serstøku byggisamtyktini, sum hevur til endamáls at skipa Karlamagnusarbreyt sum eitt miðstaðarøki fyri Hoyvík.

Politiski mynduleikin í Tórshavnar kommunu hevur tikið avgerð um minka miðstaðarøkið, og í staðin skipa hendan partin av Karlamagnusarbreyt til bústaðarøki við tilsamans 12 grundstykkir til sethús á millum uml. 375 $m^2$ og uml. 560 $m^2$.

Skipanin av økinum er sambært ásetingunum í hesum tekstskjali og kortskjølunum 1. yvirlit og 2 skipan.

## § 1. ENDAMÁL

1.1 at skipa økið, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, til bústaðarbygging.

1.2 at tryggja, at staðsetingin og tal av grundøkjum verður sum sýnt í kortskjali 2.

1.3 at skipa tilkoyring og parkeringspláss til økið.

1.4 at áseta stødd og hædd av sethúsum

## § 2. HEIMILD OG AVMARKING

2.1 Serstaka byggisamtyktin er heimilað í §4, stk. 1, í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir.

2.2 Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta kortskjali nr. 1 og fevnir um matr. nr. 135nl, 135nm, 135nn, 135no, 135np, 135nq, 135nr og 135ns, Hoyvík.

2.3 Økið er uml. tilsamans 7.600 $m^2$ til støddar og liggur í A3-øki í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

## § 3. NÝTSLA ØKISINS

3.1 Á økinum, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, kunnu byggjast 12 sethús og felags parkeringspláss til tilsamans 12 bilar sambært kortskjali 2.

## § 4. BYGGING, STØDD OG STAÐSETING

4.1 Húsini skulu byggjast innanfyri byggifeltini.

4.2 Mest loyvda hædd á húsum er 7 m frá lidnari planering.

4.3 Mest loyvda byggistig 0,3

4.4 Mest loyvda nýtslustig 0,6

## § 5. VEGIR OG PARKERINGSPLÁSS

5.1 Innkoyringar sambært kortskjali 2.

5.2 felags parkeringspláss til 12 bilar sambært kortskjali 2, umframt parkeringspláss til tveir bilar inni á hvørjum av teimum einstøku grundstykkjunum.

## § 6. BYGGIMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR

7.1 Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## § 7. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR

8.1 Tey viðurskifti, sum ikki eru viðgjørd í hesi byggisamtykt skulu viðgerast eftir almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu

8.2 Smávegis lættar frá reglunum í hesi byggisamtykt kann byggivaldið geva loyvi til, um so er, at dámurin á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

8.3 Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

[redacted]

| | |
|---|---|
| Mál nr.: | HiMR JNR. 15/00732 |
| Ætlanarskriv: | |
| Góðkent: | 7. okt 2015 |
| Váttað: | H Poulsen |